# StÍF hevði tol



*Savnsmynd*

**HONDBÓLTUR** Heimaliðið hevði tol seinastu løtuna og vann við tveimum málum, tá VÍF vitjaði í ítróttarhøllini á Skála í gjár

Uni Holm Johannesen

StÍF vann bæði stigini, tá vestmenningar vitjaðu í gjár.

Heimaliðið vísti serliga gott tol í stórum løtum av dystinum. Í álopsstøðu bíðaðu teir eftir møguleikanum og tóku av, tá teir skuldu.

Sigurin var ikki sannførandi. VÍF royndi stundum at hótta leiðsluna hjá heimaliðnum, men í seinna hálvleiki gjørdu vestmenningar ofta ov skjótt av.

*uni@sosialurin.fo*

## HAGTØL UM ATLANTIC AIRWAYS:

### **Kyndil – KÍF** 27-41 (12-21)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**5. min.: 1-2**
**10. min.: 2-3**
**15. min.: 3-9**
**20. min.: 6-12**
**25. min.: 9-17**
**35. min.: 13-25**
**40. min.: 16-30**
**45. min.: 17-33**
**50. min.: 19-35**
**55. min.: 24-35**

**Kyndil:** Hans Áki Dal-Christiansen 9, Josef Abrahamsen 7, Rúni Johansen 3, Hans Arni B. Thomsen 2, Høgni Klein Olsen 2, Andrias Sólsker 2, Ludvík Súnason 1.
Útvísingar: 12
Venjari: Henrik Gerster
**KÍF:** Ingi Johannesen 11, Niklas Reginsson 6, Regin Petersen 5, Andrias Nielsen 5, Ási Dam 4, Teitur Joensen 3, Jákup Trygvason 2, Rúni Joensen 2, Tony Weihe 1.
Útvísingar: 8
Venjari: Jan Ottesen

### **StÍF – VÍF** 23-21 (11-9)

Dómarar: Eyðun Samuelsen og Andreas Hansen

**5. min.: 1-1**
**10. min.: 2-3**
**15. min.: 3-5**
**20. min.: 6-8**
**25. min.: 8-9**
**35. min.: 12-10**
**40. min.: 13-11**
**45. min.: 17-13**
**50. min.: 19-14**
**55. min.: 20-17**

**StÍF:** Jóanes Prestá 5, Leivur Justinussen 5, Marius Joensen 3, Olgar-Jan Lervig 3, Fríði Djurhuus 2, Jógvan Berg 2, Jógvan Gregersen 1, Jákup Berthelsen 1.
Útvísingar: 0
Venjari: Jón Rasmussen
**VÍF:** Rúni Fossdal 4, Joen P. Høgnesen 4, Magnus Muller 3, Magnus á Rógvi 2, Bjarti Hansen 2, Áki G. Olsen 2, Agnar Joensen 1, Sámal Jákup Djurhuus 1, Jákup S. Andreasen 1, Jákup A. Joensen 1.
Venjari: Dia Midjord



*Mynd: Álvur Haraldsen*

# KÍF eyðmýktu grønu havnar-menninir

**HONDBÓLTUR** 14 mál skiltu Kyndil og KÍF, tá fyrsti landskappingardysturin í hesum kappingarárinum var liðugur í gjár. Kollfirðingar flongdi Kyndil

Uni Holm Johannesen

Tað var eyðmýkjandi fyri Kyndil, tá dysturin var liðugur.

KÍF vann heili 41-27 á heimavøllinum hjá grønu havnarmonnunum.

Henrik Gerster, venjari, dugdi ikki at meta um styrkina hjá mansliðnum hjá Kyndli í løtuni.

– Tað er eitt sindur trupult at siga, hvussu støðið hjá okkum er, tí venjingardystirnir hava verið bæði upp og niður, segði hann við heimasíðuna hjá Kyndli undan dystinum.

Tað ber brá av einum venjara, sum er ikki sannførdur um, at liðið fer at bjóða teimum ovastu av beinanveg.

Byrjanin hjá teimum grønu er alt annað enn sannførandi.

### Runnu undan beinanveg

Kyndil spældi ongantíð við.

Tað var klassamunur alt fyri eitt, og kollfirðingar sendu aftur og aftur í málið handan Magnusi Matras, sum vardi málið hjá Kyndli.

Serliga royndist Ingi Johannesen væl. Hann var besti skjúttin hjá gestunum úr Kollafirði. Hann stóð fyri 11 av málunum hjá KÍF.

### Bara fyrsti dystur

Úrslitið í høllini á Hálsi í gjár skal sjálvsagt takast fyri fyrivarni.

Dømini eru óteljandi, at lið hava lagt bragdliga fyri, men missur stevið seinni í kappingini. Tað eru eisini dømi um lið, sum koma illa frá landi, men fóta sær seinni. Tað ger Kyndil sum oftast.

Tí skal úrslitið ikki takast fyri meira enn tað var. KÍF hevur tvey stig, og Kyndil hevur einki stig.

*uni@sosialurin.fo*